Lívdin
- í lívd hins hægsta

Mai 2008



# Kjakfundur á Brekku



*Hóskvøldið 21. februar 2008 var fyrsti kjakfundurin á Brekku. Evnið var trúgv og politikkur. Her er tað Róland í Skorini, sum hevur framløgu. Jens Wang er stigtakari og fyriskipari av kjakfundunum.*

Hóskvøldið 15. mai 2008 kl. 20 verður kjakfundur um trúgv og vísindi í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík.

Evnið á kjakfundinum verður "Trúgv og vísindi – avbjóðingar og møguleikar" við

undirheitinum: Hvussu kunnu vit liva okkara trúgv í modernaða samfelagnum á skynsaman hátt?

Tað verða teir báðir Dánjal Jákup Jacobsen, Ph.D. í gagnnýttari støddfrøði, og Poul F. Guttesen, Ph.D. í gudfrøði og bíbilskari gransking, sum fara at hava hvør sína framløgu um vísindaliga ástøðið, ið teir arbeiða á, og hvussu hetta ávirkar trúgv teirra. Aftaná verður høvi at seta Dánjal Jákupi og Poul spurningar, og møguleiki verður hjá áhoyrarunum at taka lut í kjakinum.

## Heilagi Andin virkar við kraft

Hvítusunnan minnir okkum á, at Heilagi Andin virkar við kraft og myndugleika kring heimin í dag. Heilagi Andin livir í hvørjum einstøkum trúgvandi, og ynski Hansara er at leiða lív okkara soleiðis, at vit liva saman við Harranum Jesusi, Gudi til dýrd. „Vita tit ikki, at likam tykkara er tempul Heilaga Andans, sum í tykkum er, og sum tit hava frá Gudi, og at tit eru ikki tykkara egnu?" (1. Kor. 6:19).

Grundarlagið undir allari læru um Heilaga Andan finst í svarinum til henda spurning: Hvat pláss gevur Hann Jesusi Kristi? Høvuðsuppgáva Heilaga Andans er at dýrdargera Frelsaran (Jóh. 16:14). Heilaga Andin gevur Jesusi Kristi ta støðu og dýrd, sum Hann hevur uppiborið. Og loyva vit Gudi at leiða okkum, so fer Heilaga Andan at hjálpa okkum at lyfta Hann, sum doyði og reis upp aftur frá hinum deyðu fyri okkum, hægri í heiður og dýrd."



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Erna Háberg 65 ár



Mánadagin 21. apríl fylti Erna Háberg 65 ár. Erna er dóttir Hjørdis og Petur W. Háberg í Havn. Hon er statsgóðkend sjúkrasystir við útbúgving frá Landssjúkrahúsinum. Hon hevur starvast sum sjúkrasystir bæði í Føroyum, Noregi og Danmark og hevur havt nógv álitisstørv innan sítt yrki. Hon hevur t.d. havt leiðandi størv innan Heimahjálparskipanina í Føroyum og verið nevndarlimur í Alzheimerfelagnum, síðani tað varð stovnað. Erna hevur annars verið virkin á so mongum økjum, bæði á andaliga og tímiliga økinum.

Erna giftist í 1974 við Preben Hansen, ið er dani. Tey búgva á Argjum og eiga børnini Høgna og Maiken og ommu- og abbadóttrina Rúnu.

## Tillukku við barninum



10. apríl fingu Evie og Jonathan Warner á Sandi eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4.260 gr.

17. apríl fingu Súsanna og Guttorm Joensen í Hoyvík ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4.000 gr.

## Duddan 70 ár



Hósdagin 10. apríl fylti Gertrud Hjaltalin, vanliga nevnd Duddan, í Hoyvík 70 ár. Duddan er ættað úr Klaksvík, men hevur búð í høvuðsstaðnum, síðan hon var ung. Hon var gift við Stenberg Hjaltalin úr Havn, sum andaðist í 1997, 67 ára gamal. Tey fingu børnini Hjørleif, Schumann og Yvonnu, sum øll búgva í Havn. Ommubørnini eru sjey í tali.

Vit ynskja Dudduni hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

## Lega fyri støk

Í døgunum 23. til 25 mai 2008 verður lega fyri støk á Zarepta í Vatnsoyrum.

Legan er eisini ætlað yngri einkjum og einkjumonnum. Øll eru vælkomin at koma við børnum og uttan børn. Byrjað verður fríggjakvøldið 23. mai kl. 19.

Hesar legurnar, sum eru við í føstu skránni hjá Zarepta, hava verið nærum á hvørjum ári síðan 1999. Talan er um eitt tvørkirkjuligt tiltak, har dentur verður lagdur á gott samfelag, og skipað verður fyri ymiskum fyri alla familjuna á leguni.

Tilmelding hjá Eydnu Berg á tlf. 609651 ella 219651.

## UngLív á Margarinfabrikkini

16. mars vóru UngLív á Margarinfabrikkini og hugnaðu sær.

*Myndir: Magni á Lakjuni*




**Skráin hjá UngLív fyri mai:**

**4. mai.** Poul Guttesen undirvísir. Evni: Náði.

**11. mai.** UngLív framføra ein leik og syngja/spæla fyri teimum yngstu í sunndagskúlanum.

**18. mai.** Jógvan Zachariassen undirvísir. Evni: Frelsan.

**25. mai.** Farið verður eina útferð oman á Skansan, har spøl og pizza eru á skránni.

**1. juni:** Poul Guttesen undirvísir. Evni: At vera trúgvandi í dag, 2008, í skúlanum, í ítrótti, millum vinir o.s.fr.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli eru týskvøld kl. 20.00**

6. mai: Arbeiðið í Afrika v/Lív í Skemmuni
13. mai: Húsbólkar (einki møti)
20. mai: Skeiðvirksemi – Trin 5 *"Grundlæra og royndir í trúboðan"* (JZ)
27. mai. Skeiðvirksemi – Trin 5 *"Grundlæra og royndir í trúboðan"* (JZ)

**Heimasíða fyri tey ungu**

Tey ungu í Lívdini hava eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er www.ung.livdin.fo

**Bønarbólkur fyri kvinnur**

Fyrsta leygardag í hvørjum mánaði savnast bønarbólkur fyri kvinnur.
Áhugað kunnu venda sær til Onnu Mariu Anthoniussen (tlf. 228826) ella Poulu Sørensen (220429).

## Hugnatiltak dýra biðidag

Dýra biðidag, 18. apríl, var eitt tiltak fyri øll í Lívdini í Ítróttarhøllini á Nabb. Tiltakið byrjaði kl. 13 og var allan seinnapartin. Har vóru m.a. hoppiborgir, tarvur, sumo-wrestling fyri børn og vaksin og ymiskar borgir og banar. Møguleiki var at keypa kaffi, te, køkur, heitar vaflur, sunkist, sodavatn, poppkorn o.a. At enda var nátturði við smurdum breyði. Ein hugnadagur fyri alla familjuna. Tað var Lív Clementsen, sum samskipaði tiltakið.







*Myndir: Tórvør Vang*

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 4. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Jesus er farin til Himmals – hvat nú? (Áp. 1:9-15)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |



Jógvan

### Sunnudagin 11. mai (Hvítusunnudagur)

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (14)*<br>*"Alt í kraft Heilaga Andans" (endin á røðini)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen*<br><br>** Innseting av elstum á seinna møtinum* |



Símun

### Sunnudagin 18. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Opið evni*<br>*Talari: Símun Absalonsen* |

### Sunnudagin 25. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Opið evni*<br>*Talari: Christian Batske vitjar úr Týsklandi* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*